

*Hetta er uttanfyri klinikkina í Konso, tá ið andakt verður hildin*



*Inni í einari konsobygd*

Haile Selassie svaraði aftur við at tosa um, tá ið Danmark eisini var hersett, og londini høvdu havt somu lagnu. Hann takkaðu Danmark fyri, at tað í Sameindu Tjóðunum hevði samarbeitt við Etiopia og styðjað tess krøv.

Sagt verður eisini í greinini, at Etiopia kundi ikki roknast fyri at vera eitt demokratiskt land í norðurlendskum týdningi. Til tað var fólkið ikki nóg væl upplýst. Men keisarin hevði gjørt nógv fyri at bøta um hesi viðurskifti.

Stýrið hjá Haile Selassie var grundað á hansara persón. Hann helt hondina yvir sína egnu familju og aðalin. Hetta skapti mótstøðu, serliga frá teimum við útbúgving.

Heldur ikki var nóg nógv gjørt fyri at fáa nýhugsan á búnaðarøkinum vegna mótstøðu frá teimum, sum áttu jørðina.

I 1960 varð gjørd ein miseydnað roynd at fáa Selassie frá valdinum. Hansara nýskapanarroyndir høvdu ikki verið nóg mikið til at fáa steðgað misnøgdini í landinum.

Annars var Haile Selassie amahari og var knýttur at koptisku kirkjuni. Hann var sera vælviljaður mótvegis trúboðaravirkseminum í landinum. Hetta var ikki minst tí, at við trúboðaravirkseminum fylgdi eisini skúlar og sjúkrahús, sum tað var so stórur tørvur á. Keisarin var serliga vælviljaður móti norðmonnum. Hann var í útlegd saman við Hákun kongi í London 1940-1941. Teir vóru í somu støðu og komu at kennast.

Haile Selassie varð koyrdur frá í 1974 og doyði í 1975. Hetta fara vit at koma aftur til seinni í hesi frásøgn.

## Konso – ein annar heimur

Fyrsti partur endaði við, at eg var komin til Konso, har eg skuldi virka. Hetta var 5. oktober 1960. Eg skal greiða eitt sindur frá hesum plássi, sum eg upplivdi tað tá.

Missiónsstøðin var í eini brekku stutt uttanfyri bygdina Bakaule. Her er frálíkt útsýni, og tú sært fjøllini blána burtur í fjarleikanum. Men annars er her turt og berligt og lítil vøkstur. Tí longdist bæði fólk og fenaður eftir regni. Av tí, at vit vóru í 1600 metra hædd var kortini ikki so heitt. Heitast er frá middegi til nóns. Tá stendur sólin nærum beint yvir høvdinum. Tað vóru tá trý hús á støðini, skúlin, klinikk og sethús hjá okkum útlendingum. Síðan eru komin fleiri hús eins og talið á fólki á støðini er eisini vaksið.

Tað vóru 84 næmingar í skúlanum tá, og var hann býttur í tríggjar flokkar. Býtt var tó ikki eftir aldri. Børn og vaksin sita lið um lið.

Til klinikkina komu nógv fólk hvønn dag at fáa viðgerð fyri ymsar sjúkur. Tær vanligastu vóru malaria, dysenteri og tropisk sár. Tveir ungir etioparar arbeiddu hjá mær á klinikkini við at geva sproytur og binda um sár. Teir verða róptur dressarar. Eg kundi ynskt okkum eina sjúkrastovu. Ofta vóru sjúklingarnir so ringir, tá ið teir komu, at teir kundu ikki fara avstað aftur beinanvegin. Tá noyddust teir at liggja úti, um pláss ikki var fyri teimum inni. Tað var tó so lýtt at tað bilaði ikki.

Tað komu eini 7-800 fólk til samkomurnar sunnumorgnar. Eingin kirkja var tá, tí sótu øll undir opnum lofti. Nógv gingu langan veg, upp til 4 tímar at koma til hesar gudstænastur. Seinni er kirkja komin.

## Húsini bygd úr greinum

Konso er eitt rættuliga stórt øki við nógvum bygdum, sum liggja spjaddar á høvdum í landslagnum. Økið liggur í 15-2000 metra hædd. Millum høvdirnar er so flatlendi, har markirnar eru. Fólk høvdu eisini jørð kring húsini, sum tey dyrkaðu, men annars arbeiddu tey á slættunum og tað vóru tímar at ganga.

Tað mesta av jørðini er kørg. Bert á nøkrum av slættunum er jørðin fruktbar. Her verður so eisini dyrkað. Vanligasti reiðskapurin er slíkur, sum verður brúktur við handamegi. Har tað er meira flatt, nýttu teir oksar at draga ein plógv við einum jarnpíki niðast.

Rundan um hvørja bygd er høgur grótgarður. Hetta er fyrst og fremst fyri at fyri at verja seg ímóti villdjórum og fíggindum. Báðumegin gøturnar inni í bygdini eru eisini grótgarðar. Gøturnar eru so smalar, at fólk mugu ganga gásagongd. Hvørt húski hevur fleiri smáttur, alt eftir sum tey hava ráð til. Eina smáttu sova og matgera tey í. Tey leggja neytaskinn á gólvið til at sova á. Hesi balla tey saman, tá ið tey fara upp.

Allar smáttur eru rundar og bygdar av greinum. Tær verða bygdar omaná steyrar, sum verða settir niður í jørðina. Tær verða



*Marknaður í Konso*

vanliga flættaðar, so tær líkjast stórum kurvum. Síðan verða tær tættaðar við leir og mykju, so greinirnar ikki síggjast. Mykja kann brúkast til nógv, eisini til brennievni. Hetta er veikt tilfar og tí er tað, at smátturnar javnan mugu umvælast. Takið á smáttunum gongur upp í ein spíss. Tað er dekkað strái av korni. Ovast í spíssinum verður so sett ein øvugt krukka, so tað ikki skal regna niður.

Dyrnar frá gøtuni inn í túnið eru so lágar, at ein má bukkan seg fyri at sleppa inn. Á sama hátt eru dyrnar lágar inn í hvørja smáttu. Í túninum millum smátturnar sita fólk og arbeiða, reinsa bummull, spinna á handsnældu og veva. Hetta gera bæði mannfólk og konufólk. Men tað er mannfólkaarbeiði at veva.

So leingi tað er turt, er túnið millum smátturnar bæði uppihaldsrúm og køkur. Her verður matgjørt í einum svørtum leirílati.

## Fleiri smáttur til somu familju

Eina smáttu nýta tey til korngoymslu, eina til neyt og seyð o.s.fr. Hvør familja hevur einar tvær kýr, nakrar geitir og nakrar hønur. Hvønn morgun verða kýrnar riknar oman á slættan av hálvvaksnum ungdómi, sum ansar eftir teimum allan dagin og tær verða riknar heim aftur á kvøldi. Tá finna tær sjálvar inn á básin. Hetta er eins og í Føroyum fyrr. Kýrnar mjólka sera lítið. Hetta er tí, at tær fáa so lítið av vatni at drekka. Tí er mjólkin so tjúkk og verður mest brúkt til smør, sum verður seld.

Smátturnar at eta í hava ikki aðra innrætting enn flatar steinar at sita á og ein eldstað. Eldurin er einasta ljós í smáttunum. Tað vanliga er eisini at fara til songar, tá ið tað verður myrkt og so upp aftur, tá ið tað lýsnar.

Umframt eru í smáttuni krukkur og kør til at goyma matin í ella til at nýta til matgerðina. Íløtuni eru vanliga útholað græsker. Brotini av teimum kunnu eisini nýtast til onnur endamál sum øskubakkar. Rundan um hesar smáttur hjá hvørjum húski eru træsteyrar sum ein gyrðing. Innan hvørja gyrðing eru tískil 5-6 smáttur. Tað kunnu vera 16-17 persónar, sum búgva í eini eind. Í eini bygd kunnu vera 20-100 slíkar eindir. Alt tykist at vera væl skipað.

## Túnatos

Mitt í bygdini eru nakrar størri smáttur, sum standa á træbulum. Hesar verða kallaðar mora. Tær hava tvær hæddir. Í teirri niðaru sita menn í bygdini og tingast um dagsins mál.

Í teirri ovaru búgva búgva teir ungu ógiftu dreingirnir, ofta upp til 30-40 í hvørjari smáttu. Tá ið teir vera stórir flyta teir frá foreldrunum í hesar smáttur, og tá ið teir verða giftir flyta teir til konuna í nýbygdari smáttu. Vanliga eru teir tá framvegis blaðungir.

Í túninum framanfyri hesar